EDV-fólk

Starv í Føroya Banka

Spennandi og avbjóðandi starv
í fyrisitingardeildini í Føroya Banka

Føroya Banki hevur seinastu árini havt ein stóran búskaparligan vøkstur og er ein fyritreyt fyri gongdini, at tað áhaldandi verður arbeitt við at menna og viðlíkahalda EDV-økið í bankanum.

Alt bendir á, at tøkniligu avbjóðingarnar verða enn størri í framtíðini og verða ákomt stórir krøv sett til bankan at laga seg til broyttu umstøðurnar. Í eini ásannan av, hvussu týdningarmikil partur av gongdini EDV-skipanirnar eru, verður EDV-økið í bankanum raðfest høgt.

Starvið

- Umsiting av netumhvørvinum í bankanum, herundir back-up og support av brúkarum.
- Gerð av útskriftum
- Gera úrdrátt úr databasuni á Elektron við t.d QMF (SQL)
- Umsiting og menning av Intraneti bankans
- Víðarimenning av heimasíðuni, herundir gerð av web-formum
- Umsiting og menning av datawarehouse/datamarts
- Luttaka í arbeiðsbólkum á Elektron
- Aðrar ad-hoc uppgávur, ið javnan stinga seg upp í einum livandi umhvørvi

Førleiki

Tann, ið verður settur:

- Skal hava viðkomandi útbúgving ella arbeiðsroyndir innan nevndu øki.
- Skal hava góð samstarvsevnir og skal samstundis kunna arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur fyrimunur, um kunnleiki er til peningastovnsskipanir.

Vit rokna við, at tú hevur hollan kunnleika til EDV umhvørvi og at tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggj amboð innan EDV-økið. Tað er avgjørt ein fyrimunur, um tú kennir til NT-umhvørvi, Lotus Notes, DB2 og SQL.

Treytir

Setanartreytir verða avtalaðar eftir royndum og førleika hjá umsøkjara.

Umsókn

Hevur tú áhuga at royna nýggjar avbjóðingar, ert tú vælkomin at søkja starvið við at senda umsókn saman við viðkomandi skjølum til:

P/F Føroya Banki
Starvsfólkadeildin
Att.: Bjarki Mohr
Postboks 3048
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 7. februar 2002.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Vestergaard ella Regin Frederiksen á fyrisitingardeildini.

FØROYA BANKI

Web-samskipari á Føroya Tele

"Byrjanin til alla vísind er ein undran á, at tingini eru, sum tey eru"
Aristoteles



Websamskipari okkara er farin í nýtt og avbjóðandi starv á Føroya Tele, og leita vit eftir einum nýggjum web-samkipara.

Hevur tú arbeitt við framtakshugaðum og framkomnum web-loysnum? Og hevur tú hug til menning, at forrita og at leggja inn ymisk internetforrit? Um ja, so ert tú møguliga tann m/k, vit ynskja at seta í fast starv á Føroya Tele. Sum høvuðsarbeiðsuppgávu fært tú ábyrgd av at samskipa og umsita forritpartin og teknisku menningina av websíðunum hjá Føroya Tele.

Vit bjóða sera áhugaverdar arbeiðsumstøður á Føroya Tele, sum m.a. umfata:
- rakstur og viðlíkahald av websíðunum hjá Føroya Tele
- at forrita serútgerð, brúkara-markamót o.a. tólbúnað
- at búna nýggjar internettænastur
- at veita innanhýsis ráðgeving
- møguleika fyri víðari sertifisering

Tínar kvalifikatiónir umfata m.a. at tú:
- í stóran mun dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ert nærlagdur/nærlagd
- hevur kunnleika til at forrita í: ASP, PHP, Adobe GOLive, SQL
- hevur kunnleika til Adobe ritbúnaðir (t.d. PhotoShop)
- hevur kunnleika og royndir innan TCP/IP og Internet
- hevur kunnleika til Windows2000 og – NT, SQL Server 2000, Access, MySQL
- hevur kunnleika til IIS/Apache web-servara
- ert opin og dugir væl at tosa og læra frá tær
- hevur hugsjónir um Internet
- dugir enskt

Vit rokna við, at tú hevur útbúgving innan EDV ella møguliga aðra viðkomandi útbúgving ella royndir.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið ella annað viðkomandi yrkisfelag, og verður starvið at seta skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til deildarleiðaran á Teleforlagnum, Jens Paula G. Nolsøe ella Starvsfólkadeildina. - Á Tel. 30 30 30.

Umsóknir skulu vera Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi hósdagin 24. januar 2002 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
FO-110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av megin partinum av fjarskiftisflutningunum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, og hetta setur stór krav til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!

Vit skulu verja brúkaran við eini føroyskari skipan

–Vit taka fult undir við at brúkarin í Føroyum verður tryggjaður best møguligt. Men tað skal ikki gerast á tann hátt, sum javanaðarflokkurin vil, sigur Tjóðveldisflokkurin

BRÚKARAVERND
Áki Bertholdsen

– Sjálvsagt skal brúkarin í Føroyum tryggjast best møguligt. Spurningurin er bara, hvussu tað skal gerast. Og vit halda ikki,at hátturin, sum javnaðarflokkurin ætlar at gera tað uppá, er tann rætti.

Sigur Signar á Brúnni, sum var framsøgumaður tjóðveldsifloksins, tá ið uppskotið frá javnaðarflokkinum um brúkarastovn, varð til 1. viðgerð í Løgtinginum.

Sum tað sæst á grein aðrastaðni í blaðnum, er framsøgumaður javnaðarfloksins, Hans Pauli Strøm serliga vónsvikin av, at tjóðveldisflokkurin ikki vildi taka undir við uppskotinum.

Vit hava spurt Signar á Brúnni, hví Tjóðveldisflokkurin ikki vil taka undir við uppskotinum.

– Tað er ongin ivi um, at vit eiga at raðfesta brúkaran frammaliga og at tryggja hann best møguligt.

Hann sigur, at tjóðveldisflokkurin heldur ikki, at er rætti mátin at gera tað við at flyta ta donsku ella ta norsku skipanina og seta tær í verk í Føroyum, tí tær eru gjørdar til samfeløg, sum eru hundrað ferðir størri enn okkara.

– Íslendingar hava eina aðra skipan, sum er nógv bíligari, og vit eiga eisini at kanna, hvussu hon virkar.

– Skulu vit hava ein serstaka brúkarsskipan í Føroyum, eiga vit at gera eina skipan, sum hóskar eitt lítið samfelag sum okkara, ístaðin fyri at flyta eina skipan inn á okkum, sum er gjørd til eitt stórt samfelag.

Hann vísir millum annað á, at í Føroyum er nógv styttri ímillum tann sum keypir og tann sum selir, enn tað er í Í Danmark og í Svøríki.

– Øll kenna hvønn annan og eru viðurskifti, eg eri misnøgdur við, antin tá ið eg eri á verkstað við bilinu, ella keypi í einum handli, ber til at fáa tað í rættlag í eini handavending.

Hann vísir eisini á, at kappingin er so hørð í dag, at ongin fyritøka hevur ráð til at lata vera við at geva viðskiftafólki sínum tað bestu tænastuna og tað er góð brúkaravernd í sær sjálvum, heldur Signar á Brúnni.



–Tjóðveldisflokkurin heldur, at brúkarin skal trygjast best møguligt. Men vit halda ikki, at tað er rætt at seta ein almennan stovn á stovn afturat, tí tað kann gerast á annan hátt, sum hóska seg betri til eitt lítið samfelag, sigur Signar á Brúnni

Ikki ein stovn afturat

Signar á Brúnni vísir eisini á, at tað eru einar 6-7 lógir í gildi í Føroyum, sum hava við keyp og sølu at gera, eitt nú kappingarlógin og hann heldur, at vit eiga at kanna, um tað ikki ber til at byggja brúkaraverndina inn í eina ella fleiri av hesum lógunum.

Í tí liggur eisini, at Tjóðveldisflokkurin aftrar seg við at byggja eina nýggjan almennan stovn upp afturat í Føroyum.

– Tað verður sagt, at hann fer at kosta góðar tvær milliónir um árið, men vit vita av royndum, at almennir stovnar hava lyndi til at bólgna, sigur Signar á Brúnni.

– Tað kann væl verða, at onkur sigur, at tvær milliónir er ein dropi í havinum. Men tað er eitt gamalr orðatak, at "mangir løkir smáir, gera stórar áir", sigur Signar á Brúnni.

Hans Pauli Strøm vónbrotin av tjóðveldisflokkinum

Fólkaflokkurin og sambandsflokkurin tóku ta støðu, eg hevði væntað. Men tað var eitt vónbrot, at tjóðveldisflokkinum ikki vísti vælvild, sigur Hans Pauli Strøm eftir at uppskotið um brúkaravernd hevur verið fyri í tinginum

BRÚKARAVERND
Áki Bertholdsen

– Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin reageraðu sum eg hevði væntað. Men eg hevði ikki væntað, at Tjóðveldisflokkurin var so negativur.

Hans Pauli Strøm, tingmaður fyri javnaðarflokkin, dylir ikki fyri, at hann er vónsvikin av støðuni, sum tjóðveldisflokkurin hevði til uppskotið frá javnaðarflokkinum um at seta brúkaravernd á stovn.

– Tað er onki politiskt dynamitt í hesum uppskotinum og tí hevði eg avgjørt væntað, at tjóðveldisflokkurin fór at taka undir við tí. Men tað óvæntaða hendi, at tað gjørdi hann ikki, og tað við somu grundgevingum, sum fólkaflokkurin hevði fyri at vera ímóti.

Tveir mátar

– Báðir flokkarnir meintu í fyrstu syftu at tað var skeivt at seta ta donsku ella ta norsku skipanina í verk í Føroyum, tí tær vórðu gjørdar til stór samfeløg og okkara er eitt lítið samfelag. Teir vóru eisini ímóti at seta ein almennan stovn afturat á stovn í Føroyum.

– Til tað fyrra er at siga, at tað eru tveir mátar at gera hetta uppá. Annar mátin er tann norðurlendski mátin, har brúkarastovnar av ymsum slagi, eitt nú, brúkarastýrilsi, brúkararáð, brúkaraumboð, eru skipaðir beinleiðis undir landinum, og harumframt eru kappingarráð eisini undir landinum.

Hin mátin er tann íslendski mátin, har kappingarráð og brúkaravernd er skipað í sama stovni.

– Áðrenn vit løgdu uppskotið fyri tingið, kannaðu vit málið væl og virðiliga og tað er ongin ivi um, at íslendingar eru sera misnøgdir við teirra skipan og mæltu okkum beinleiðis frá at seta hana í verk, tí teir meina, at brúkaraverndin og kappingarráð eru mótstríðandi endamál.

Brúkaraverndin eru serstøk brúkaraáhugamál, men kappingarráðið regulerar viðurskiftini vinnuna ímillum, og har verða atlitini fyri brúkaranum altíð skúgvað til viks. Tí hava íslendingar í nógv ár kravt at brúkaraverndin og kappingarráðið verða skild sundur.

– Tað eru neyvan fleiri mátar at skipa hesi viðurskiftini uppá, tí ein djúpur tallerkur er ein djúpur tallerkur, antin hann er gjørdur í Danmark ella í Føroyum.

Ikki eitt kopi

Annars vísir Hans Pauli Strøm aftur, at talan er um at flyta danska ella svenska skipan yvir á føroysk viðurskifti.

– Allar teir brúkarastovnar, sum danir og sviar hava, við fleiri fleiri fyrisitingum, mæla vit til at leggja saman í ein lítlan stovn, sum kostar góðar tvær milliónir, sigur hann.

Mótviljan ímóti at skipa almennar stovnar, skilir hann ikki.

– Fyri fýra fimm árum síðani var øll landsins fyrisiting beinleiðis undir landsstýrinum og tá kostaði hon góðar 30 milliónir. Síðani er samfelagið bygt nógv út og tørvur hevur tí eisini verið at bygt fyrisitingina út og tískil er nú sjey aðalstýri skipað, sum tilsamans kosta 60 milliónir, tvs, at fyrisitingin er tvífaldað við nógvum nýggjum stovnum.

– Vit fara týsdagin at hava aðalorðaskifti í tinginum um náttúru um umhvørvismál, og har verður mælt til at stovna eina serskilda natúru- umhvørvis- og lendisfyrisiting.

Ein landsstýrismaður hevur eisini skotið upp at stovna eitt stýrið afturat, sum eitur "Lógmálastýrið". Og triðja dømi er, at aftur ein landsstýrismaður hevur skotið upp at seta eina nýggja barnaverndarfyrisiting á stovn,

–Tað, eg royni at siga, er, at so hvørt, sum samfelagið verður bygt út, er eisini neyðugt at byggja fyrisitingina út fyri at hava skipað viðurskifti á teimum ymsu økjunum.

– Brúkaravernd er eitt ovurstórt málsøki. Vit keypa mvg skyldugar vørur og tænastur fyri sjey milliardir um árið, og tí skilji eg ikki mótstøðuna ímóti at fáa skipað viðurskfifti á hesum øki, sigur Hans Pauli Strøm, Løgtingsmaður

– Men hví tað skal vera mótstøða ímóti eini lítlari fyrisiting, sum verjir brúkaran, skilji eg ikki, tí hetta er eitt ovurstórt málsøki-vit keypa mvg skyldugar vørur og tænastur fyri sjey milliardir um árið, sigur Hans Pauli Strøm.

–Orsøkin er uttan iva tann einfalda, at talan er um eitt andstøðuuppskot og tí ber ikki til at taka undir við tí.

Men hann leggur afturat, at alt tað stóra fyrireikingararbeiðið er ikki spilt, tí hóast javnaðarflokkurin ikki fekk undirtøku fyri uppskotinum í hesum umfarinum, liggur uppskotið klárt at taka framaftur, tá ið høvi byst.

–Val verður í vár og kemur javnaðarflokkurin soleiðis fyri, at hann kemur í samráðingar um samgongu, er hetta uttan iva eitt mál, sum verður tikið framaftur, sigur hann.